# Serlig støða hjá alivinnuni

**– Fær alivinnan nýggjan eginpening, er Føroya Sparikassi til reiðar at fíggja endurreisnina av alivinnuni, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa**



*Forstjórin í Føroya Sparikassa heldur, at útlendskur kapitalur kundi verið ein av møguligu bjargingunum hjá einari illa sperdari føroyskari alivinnu.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

BÙSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Støðan í alivinnuni er orsøkin til, at Føroya Sparikassi fyrstu seks mánaðirnar í ár almannakunngjørdi eitt hall upp á 54 milliónir krónur. Burturleggingar móti tapi fyri í alt 138 milliónir krónur vórðu gjørdar, og harav skyldast meginparturin skeivu gongdini í alivinnuni.

Forstjórin í Føroya Sparikassa, Marner Jacobsen, sigur, at Sparikassin sjálvandi ikki er nøgdur við gongdina. Men talan er um eina heilt serliga støðu.

Hetta støðan er íkomin nýliga. Alivinnan hevur havt tað trupult við ILA í

longri tíð, men tað avgerandi var, tá ES avtók minstaprísin hjá norðmonnum. Hetta hevur gjørt, at prísgongdin er farin at ganga skeiva vegin, sigur Marner Jacobsen.

Minstiprísurin tryggjaði, at prísurin á aldum Atlantshavslaksi ikki fór undir 24 norskar krónur fyri hvørt kilo. Norra eigur nógv tann størsta marknaðarpartin í heiminum. Føroyskir alarar eiga um trý prosent av samlaða heimsmarknaðinum.

Síðani minstiprísurin varð avtikin, er prísurin farin heilt í botn. Framleiðslukostnaðurin í Føroyum er einar tjúgu krónur fyri hvørt kilo, og tað er tískil skjótt at rokna út, at føroyska alivinnan missir nógva pening í løtuni.

Prísurin hevur verið niðri á einum trettan krónum fyri hvørt, men er síðani farin nakað upp, men er framvegis ov lágur.

Og hvør króna í kiloprísinum er avgerandi fyri, hvussu stórt tap verður realiserað hjá Føroya Sparikassa av burturleggingunum í ár. Verður prísinum restina av árinum enn lægri enn higartil, so kann tað væl hugsast, at Føroya Sparikassi noyðist at seta enn meira av móti tapi.

Hóast alvinnan nú merkir stór tap fyri Føroya Sparikassa, heldur Marner Jacobsen ikki, at Sparikassin hevur gjørt og nógv av við at fíggja alivinnuna.

– Tað haldi eg ikki, at vit hava. Tá hugsað verður um, hvussu stóran mótgang alivinnan hevur havt, so hevur hon klárað betri enn flest aðrar vinnur. Hendan støðan er heilt serlig, og vit roknað eisini við, at prísirnir fara uppaftur, sigur Marner Jacobsen.

Eins og onnur kann Marner Jacobsen bert staðfesta, at ein stórur partur av eginpeninginum í alivinnuni er mistur. Og ein størri eginogn er eisin fortreytin fyri, at Føroya Sparikassi fer at lata fígging til alivinnuna.

Marner Jacobsen metir, at lágu prísirnir fara at gera seg galdandi kanska eitt ár afturat, og tað fer at merkja, at fleiri alifyritøkur, sum ikki fáa nýggjan eginpening, eru í stórum vanda fyri at fara av knóranum.

Men nú mugu vit halda høvdið kalt og ikki renna skríggjandi vekk, sigur

Marner Jacobsen, sum heldur, at vit kunnu læra av hesum, at ásetingar um minstaprís skapa ein kunstigan prís og síðsta enda gera størri skaða enn gagn. Heldur eiga vanligar marknaðartreytir at avgera prísin.

Gongdin í alivinnuni er nógv upp og niður, men trupulleikin, metir Marner, er tann, at nú vánaligir prísir eru, so minkar framleiðslan nógv. Tá so aftur góðir prísir eru at fáa, so er lítið at selja, og framleiðslan verður aftur tá økt, og soleiðis kundi verið hildið fram.

## Pant avgerandi

Men hvussu fáa vit so vent gongdini? Hvussu kann nýggjur eginpeningur fáast til vega?

– Tað er ringt at fáa eyga á nakran váðafúsan kapital í Føroyum. Tí kundi ein møguleiki verið at fingið fatur á útlendskum kapitali, sigur Marner Jacobsen.

Sambært sparikassastjóranum er tað ein av fortreytunum fyri, at alivinnan skal kunna koma á føtur aftur, at peningastovnar kunnu fáa pant í aliloyvunum. Higartil hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, avvíst hesum tankanum fult og heilt. Men Marner Jacobsen hevur eina aðra støðu:

– So velur mann, at eingin alivinna skal vera í Føroyum, sigur Marner Jacobsen.

Spurdur, um ein nóg stórur innsatsur verður gjørdur í Føroyum fyri at basa ILA í Føroyum, svarar Marner Jacobsen, at tað er ógvuliga trupult at basa ILA, tí eingin veruliga veit, hvussu hetta skal gerast. Men hann leggur dent á, at hann metir øll taka trupulleikan í størsta álvara.

Forstjórin vísir eisini aftur, at Sparikassin hevur verið ov agresivur at fíggja alivinnuna.

Støðan í dag er heilt serlig. Vit mugu rokna við, at av nátúrligum orsøkum

gongur upp og niður í føroyska búskapinum við einari fiskivinnu og alivinnu. Hetta er nakað vit eins og onnur mugu liva við, sigur Marner Jacobsen, sum sigur, at Sparikassin er til reiðar at fíggja alivinnuna, um nóg stórur eginpeningur er til staðar.

12,5% av útláninum hjá Føroya Sparikassi er lánt til alivinnuna. Hetta er einar fimmhundrað milliónir av knappum fýra milliardum.

## Steðgar búskaparvøkstri

Støðan í alivunnini og trupulleikar í rækjuvinnuni hava fingið fleiri búskaparfrøðingar at siga, at ein møgulig búskaparlig afturgongd er ávegis í Føroyum.

Vit skulu ikki rokna við nakrari kreppu, tí føroyski búskapurin er sum heild

væl fyri. Í løtuni arbeiða eini áttahundrað fólk í alivinnuni. Gerst kanska ein stórur partur av teimum arbeiðsleys, so minkar eftirspurningurin í Føroyum, sigur Marner Jacobsen.

Forstjórin heldur, at ein afturgongd í búskaparvøkstrinum í øllum førum fer at gera seg galdandi, men hann dugir ikki at siga, hvussu álvarsligt hetta verður.

## Økja

Í roknskapartølunum hjá Sparikassanum sæst eisini, at útlánini eru størri enn innlánini. Samstundis er skuldin til aðrar peningastovnar voksin við góðum trýhundrað milliónum.

– Vit hava eina eginogn, og hana mugu vit eisini forrenta, sigur Marner Jacobsen, tá spurt verður eftir, hví farið verður soleiðis fram.

Solvensurin hjá Føroya Sparikassi, t.e. eginpeningur mótvegis skyldum, er 21%, og hetta er væl meira enn flest allir peningastovnar í somu støðd í kongaríkinum. Tískil heldur forstjórin, at tað rúm hjá teimum at seta meira pening í umferð.

# Einki øðrvísi



*Hóast minni rúsdrekka verður keypt í ár enn í fjør, so keypa føroyingar kortini meira til ólavsøku enn til nakað annað.*

Òlavsøkan er samstundis sum at vera tjóðarhátíðin føroyinga eisini tann tíðin, tá føroyingar keypa og drekka mest av rúsdrekka.

Á deildunum hjá Rúsdrekkasøla landsins er tað serliga í Havn, at tey leggja hetta til merkis. Dagmar Joensen, stjóri fyri Rúsdrekkasølu landsins, sigur, at allar deildirnar hava fitt at gera um ólavsøkuna, men tað er serliga deildina í Havn, sum selir sum einki annað tíðspunkt á árinum.

Men føroyingar keypa sum heild minni rúsdrekka í ár enn í fjør, sigur Dagmar Joensen. Og hetta sæst eisini aftur í sambandi við ólavsøkuna. Kortini verður nógv keypt, og ólavsøkan verður mestur eisini ríkiliga vát í ár.

Fólk keypa eisini øl og rúsdrekka sum vant. Blandaðu drykkirnar við vodka og sodavatni eru tiknir av hillunum, men Dagmar heldur ikki, at tað er ger tann stóra munin.

Hesir drykkir vóru altíð eitt sindur ovurmettir. Teir fingu nógva umtalu, men

tað var ikki tann heilt stóra sølan. Eg haldi, at fólk hava funnið sær onnur alternativ, sigur Dagmar Joensen.

Rúsan hevur opið í dag – fríggjadag – afturat áðrenn ólavsøku.



# Heini O. Heinesen hóttir samgonguna

**Tingmaður Tjóðveldisfloksins, Heini O. Heinesen, er sera misnøgdur við framferðarháttin hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, viðvíkjandi gongdini í málinum um Norðoyatunnilin. – Løgtingið samtykti uppskotið 30. apríl 2002, og enn er einki hent. Hetta er ikki til at liva við, og samgongusamstarv okkara kann ikki halda fram, um einki hendir skjótt, sigur Heini O. Heinesen**

SAMGONGUSTRÍÐ
*Heini í Skorini*

Enn einaferð er stríð millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, hesaferð í sambandi við málið um Norðoyatunnilin. Heini O. Heinesen, tingmaður Tjóðveldisfloksins, er sera misnøgdur við, at eingin framgongd er at síggja í arbeiðinum við undirsjóvartunnlinum undir Leirvíksfjørð, og hóttir hann nú at slíta alt samstarv við samgonguna. Sum seytjandi maður í samgonguni er ikki torført at gita sær til, hvørjar avleiðingarnar vera, um Heini O. Heinesen hesaferð ger álvara av sínum ávaringum móti Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum.

## – Bjarni vil sabotera projektið

Heini O. Heinesen heldur ongum ákærum aftur mótvegis Bjara Djurholm, og vísir hann á, at Bjarni tykist ikki hava nakrar ætlanir um at eftirlíka tí, Løgtingið samtykti í apríl 2002.

– Bjarni Djurholm heldur á at útseta málið, og tað tykist sum hann als ikki ætlar at føra tað út í lívið, sum landsins hægsti myndugleiki langt síðani hevur samtykt, sigur Heini O. Heinesen. Hann heldur fram og sigur, at við hesum tykist Bjarni Djurholm hava ætlanir um at sabotera projektið og fáa tað at detta niðurfyri. Sostatt er talan um álvarsamar atfinningar frá Heina O. Heinesen móti Vinnumálastýrinum og Bjarna Djurholm.

Síðani uppskotið varð samtykt í apríl 2002, hevur Landsstýrið gjørt fleiri broytingar, men hetta hevur sambært Heina O. Heinesen als ikki verið góðar og neyðugar broytingar.

– Tær broytingar, Landsstýrið higartil hevur framt, er bert fíggjarligt pynt uttan nakran stórvegis týdning. Fyri ikki at vera tvørur tók eg undir við hesum broytingum, men síðani tá er als einki hent í málinum, sigur løgtingsmaður Tjóðveldisfloksins.

## Sama søgan, sami flokkur

Heini O. Heinesen metir ikki, at ein kann halda á at samstarva við ein flokk, sum ferð eftir ferð ber seg grundleggjandi skeivt at í landsstýrissessum.

– Hetta er sama søgan og sami flokkur, sum enn einaferð vísir umsitingarligt maktarloysi og enntá lógarbrot, sum talan er um, tá ein landsstýrismaður ikki fylgir løgtingssamtyktunum.

Í staðin fyri at vera Løgtingsins tænari, sum ein og hvør landsstýrismaður eigur at vera, hevur Bjarni Djurholm sambært Heina O. Heinesen heilt ignorerað Løgtingið og farin sín egna veg. Hetta eru júst somu forðingar, sum ein annar landsstýrismaður í Fólkaflokkinum royndi at gera í 1998 í arbeiðnum við Vágatunnlinum.

Heini O. Heinesen leggur afturat, at júst nú hevur Bjarni orsøk at draga málið út, tí við støði í samlaðu búskaparligu gongdini við minni peningi og alsamt minkandi vøkstri kann arbeiði detta niðurfyri. Tískil er neyðugt at seta skjøtil á arbeiði skjótast gjørligt.



*Heini O. Heinesen hóttir nú við samgongusliti, um ferð ikki kemur á arbeiðið við Norðoyatunnlinum. - Bjarni Djurholm mótarbeiðir løgtingsins vilja og saboterar projektið. Hetta kann eingin liva við, og tískil er ógjørligt framhaldandi at samarbeiða í slíkari samgongu*

## Hóttir við samgongusliti

Sostatt hóttir Heini O. Heinesen við samgongusliti fáar dagar áðrenn tingsetuna á Ólavsøkuni. Bólturin liggur hjá Fólkaflokkinum, og Bjarni hevur soviið í tímanum og mótarbeitt løgtingssamtyktini. Heini vísir á, at ongantíð fyrr hevur hann upplivað slíkt í politiska lívi sínum, og um einki verður gjørt, ætlar Heini O. Heinesen sær ikki at stuðla samgonguni longur.

– Ein og hvør umbering og frágreiðing frá Bjarna Djurholm kann ikki góðtakast, tí málið hevur ligið stilt so leingi. Tað hevur verið klárt at farið til verka í langa tíð, lógin varð samtykt áðrenn seinasta val, peningur er játtaður, og ein og hvør brochmannslestur frá Bjarna er bert uttanumtos og kávalótir. Eg slíti samgonguna, um ferð ikki kemur á arbeiðið, og tað skjótt, endar ein bersøgin Heini O. Heinesen.

Sostatt tykist talan enn einaferð vera um ósemjur í samgonguni, og enn einaferð eru umboð úr Tjóðveldis- og Fólkaflokkinum í hornatøkum. Sambært Heina O. Heinesen kann ósemjan í versta føri enda við samgongusliti.

# – Heini púra burturvið

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, heldur onga orsøk vera til skuldsetingarnar og hóttanirnar frá Heina O. Heinesen. – Higartil hevur arbeiðið við Norðoyatunnlinum gingið, sum tað skal, og um Heini ætlar at slíta samgonguna orsakað av hesum, hevur hann valt skeivt mál, sigur Bjarni Djurholm, sum heldur framferðarháttin hjá tingmanni Tjóðveldisfloksins vera púra burturvið**



*Bjarni Djurholm vísir øllum skuldsetingum aftur og sigur, at ákærurnar hjá Heina O. Heinesen eru uttan orsøk og púra burturvið. - Um Heini ætlar at slíta samgonguna orsakað av hesum, hevur hann valt eitt skeivt mál, sigur Bjarni Djurholm*

SAMGONGUSTRÍÐ
*Heini í Skorini*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, vísir øllum atfinningum frá Heina O. Heinesen aftur. Satt at siga hevur Heini O. Heinesen sambært Vinnumálaráðharranum einki at finnast at. Arbeiðið við Norðoyatunnlinum gongur sína gongd, og tá talan er um slíkt stórarbeiði, tekur tað sjálvsagt sína tíð.

## Arbeiða skjótast gjørligt

Bjarni Djurholm sigur við Sosialin, at higartil hevur arbeiðið gingið skjótast gjørligt.

– Boðini frá Vinnumálastýrinum til Partafelagið Norðoyatunnilin og Landsverkfrøðingin hava allatíðina verið at arbeiða miðvíst við projektinum, og hóast nøkur viðurskifti hava seinkað gongdina nakað, hevur sum heild verið arbeitt skjótast gjørligt, sigur Bjarni Djurholm.

Í hesum høpi varð játtan frá Fíggjarmálaráðnum strikað á umleið 300.000 krónur, og tríggjar ferðir hevur Vinnumálastýrið biðið um eykajáttan frá Fíggjarmálaráðnum at byrja arbeiðið við. Viðvíkjandi lendinum í Klaksvík, har vegagerð er á skránni í næstum, skal Friðingarnevndin eisini geva grønt ljós, og nøkur ivamál hava verið viðvíkjandi fornfrøðiligum viðurskiftum og linjuforðingum í Leirvíksfirði, har ymsar kanningar eisini hava verið neyðugar.

## Arbeiðini boðin út

Í einum so týdningarmiklum og kravmiklum arbeiði er talan sambært Bjarna Djurholm í flestu førum um, at viðurskifti stinga seg upp, sum seinka gongdina, men higartil hevur einki álvarsamt forðað fyri ætlanini, og í nærmastu framtíð fer arbeiðið í gongd.

– Partafelagið Norðoyatunnilin hevur bjóðað arbeiðið út til vegagerð við tunnilsmunnan í Leirvík, og tilboðini skulu vera inni aftur 12. august. Sjey entreprenørar eru inni í myndini, sigur Bjarni Djurholm.

Vinnumálaráðharrin heldur fram at siga, at hini arbeiðini eisini eru boðin út, og tilboðini skulu vera inni í nærmastu framtíð, so klárt er at byrja uppá sjálvt arbeiðið. Í vár góðkendi Landsverkfrøðingurin forprojektið, og væntandi verður detailprojektið góðkent um ein mánað.

– Hetta arbeiðið verður boðið út í august/september, og skulu tilboðini vera inni seinnu helvt av oktober mánaði. Bjarni Djurholm sigur, at arbeiðið fyrst byrjar í Leirvík, og væntandi fer hetta í gongd um mánaðarskifti november/desember.

Viðvíkjandi búskaparligu konjunkturgongdini í Føroyum í løtuni tykjast komandi árini fara at vera meiri soltin enn undanfarnu. Hetta kann sambært Heina O. Heinesen eisini hava ávirkan á arbeiðið, men tað tykist Vinnumálaráðharrin ikki stúra fyri.

– Tá vit eftir ølluma at døma fara inn í eitt tíðarskeið við minni peningi enn undanfarin ár, er júst týdningarmikið at fáa gongd á og arbeiða miðvíst við projektinum. Negativa konjunkturgongdin nýtist ikki at forða fyri arbeiðnum, um rætti framferðarháttur verður nýttur, sigur Bjarni, sum leggur afturat, at landskassin skal gjalda 32 mió. um árið undantikið 2004, tá einki verður goldið.

## – Heini burturvið

Sostatt tykist arbeiðið sambært Bjarna Djurholm kunnað fara av bakkastokki í nærmastu framtíð, og hann vísir á, at Heini O. Heinesen onga orsøk hevur til ákærurnar og álvarsomu hóttanirnar.

– Tá eitt projekt er í gongd, sum kostar 300-400 mió., ber ikki til at rista tað heila úr ermuni uttan nakað hóvasták. Talan er um eitt sera stórt og kostnaðarmikið projekt, sum eftir umstøðunum higartil hevur gingið væl, og tískil er tað heilt burturvið at koma við teimum útsøgnum, Heini O. Heinesen nú hevur borðreitt við, sigur Bjarni Djurholm. Hann leggur afturat, at higartil er alt avgreitt, sum kann vera avgreitt.

– Um Heini O. Heinesen vil slíta samgonguna orsakað av hesum, hevur hann avgjørt valt skeivt mál, og skuldsetingarnar eru heilt hol í høvdið, eru seinastu viðmerkingarnar hjá Bjarna Djurholm um álvarsomu skuldsetingarnar frá Heina O. Heinesen, sum í versta føri kunnu elva til samgonguslit.